# Fólk keypa sum í krígsstøðu

**- Tað er spell, um fólk keypa so nógv inn undir seg, at vørurnar spillast samstundis sum onnur, ið hava minst líka so stóran tørv á matvørum og øðrum, men hava minni ráð at keypa inn í stórum, koma at sita eftir við lítlum ella ongum, sigur Ingeborg Vinther**

**VERKFALLIÐ**
*Vilmund Jacobsen*



*Tað, at øll arbeiðarafeløgini kring landið hesaferð standa saman í stríðnum um betri kor, er ivaleyst ein orsøkin til, at fólk taka hetta verkfallið í so stórum álvara og leggja so nógv inn undir seg. - Hetta minnir um krígsstøðu, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í FA*

Verkfallið gongur sína gongd og hevur avleiðingar av ymiskum slagi við sær kring alt landið. Tað, sum rakar meinast, er, oljan og bensinið, sum ganga undan, umframt neyðsynjarvørurnar í handlunum, sum fólk hava roynt at lagt inn undir seg.

Gravgangurin var stórur teir fyrstu dagarnar, tí fólk vistu ikki rættiliga, hvørjar vørur tey kunnu vænta sær, um verkfallið verður drúgt. Breyð, mjólk, epli og aðrar neyðsynjarvørur vórðu rivin av hillunum, og røðirnar av fólki við diskarnar vóru langar. Sum dagarnir eru gingnir, eru fólk vorðin heldur meira sinnilig aftur, hóast eingin enn veit, hvussu drúgt hetta verkfallið kann gerast.

## Líkist krígsstøðu

Hví fólk hava lagt meira inn undir seg hesaferð enn valigt, tá ið verkfall er í ljósmála, er ilt at siga, men høvuðsorsøkin er ivaleyst, at øll arbeiðarafeløgini nú standa saman, og tí er sjálvsagt væntandi, at verkfallið sum dagarnir ganga kemur at raka meint um alt landið.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at reaktiónirnar hesaferð líkjast teimum, vit síggja, tá ið krígsstøða er.

- Eg haldi ikki, vit nakrantíð áður hava sæð, at fólk hava keypt so nógv inn undir seg uppundir og undir einum verkfalli sum hesaferð.

Hon skilir, at fólk royna at gardera seg sum best í slíkari støðu, men ásannar, at tað eru ikki øll, sum hava líka nógvan pening at keypa fyri.

- Tað er spell, um fólk keypa so nógv inn undir seg, at vørurnar spillast samstundis sum onnur, ið hava minst líka so stóran tørv á matvørum og øðrum, men hava minni ráð at keypa inn í stórum, koma at sita við lítlum ella ongum, sigur Ingeborg.

## Undantøk

Hon vísir á, at strandfaraskipini, sum eru rakt av verkfallinum, men hava fingið undantaksloyvi at sigla, kunnu ikki flyta vanligan farm um firðirnar. Tó er mjólkin undantikin.

- Vit hava avgjørt, at mjólkaflutningurin verður ikki raktur av verkfallinum, ei heldur tey gomlu og sjúku á sjúkrahúsunum og røktarheimunum kring landið. Matur verður borin, og tað verður vaskað, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í FA.

# Bjóða sær at gera verkfalsrakt arbeiði

**Fólk, sum gera verkfalsrakt arbeiði, verða koyrd úr feløgunum, og tey kunnu vænta sær stórar bøtur fyri at fáa limaskap aftur.**
**- At gera verkfalsrakt arbeiði, hevur altíð verið mett sum stór og vanærilig skomm, men líkt er ikki til, at øll hugsa soleiðis í dag, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag**

**VERKFALLIÐ**
*Vilmund Jacobsen*



*- Vit kundu á ongan hátt fara niður um tað, vit fingu við samráðingarnar fyri tveimum árum síðan, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag*

Tá ið Sosialurin tosaði við forkvinnuna í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther fyrrapartin í gjár, høvdu feløgini ikki avgjørt, um tey - og ei heldur nær - tey fara at herða verkfallið við møguligum blokadum.

- Men vit hava sett nógvar vaktir ymsastaðni við arbeiðsplássini til at ansa eftir, at alt fer regluliga fram.

Ingeborg Vinther sigur, at tað eru fólk, sum bjóða seg fram at gera verkfalsrakt arbeiði, og tað eru eisini arbeiðsgevarar, sum biðja fólk taka upp verkfalsrakt arbeiði.

- Hetta er ógvuliga ódámligt, og vit vilja gera alt fyri at fyribyrgja og steðga hesum óskili.

## Vanærilig skomm

Ingeborg vísir á, at tað altíð hevur verið sæð niður á fólk, sum taka upp verkfalsrakt arbeiði.

- Hetta hevur altíð verið mett sum stór og vanærilig skomm, men líkt er ikki til, at øll hugsa soleiðis í dag.

Hon sigur, at feløgini, sum eru í verkfalli, hava fleiri dømir um, at fólk bjóða seg fram.

- Og vit vita eisini um arbeiðsgevarar, sum biðja fólk koma til arbeiðis at gera arbeiði, ið er rakt av verkfalli.

Formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at limir í feløgunum, sum átaka sær slíkar skitnar uppgávur, verður koyrd úr feløgunum.

- Tey kunnu eisini vænta sær stórar bøtur fyri at fáa limaskapin í rættlag aftur. Tað er jú púra burtur við, at slíkt verður gjørt, samstundis sum onnur stríðast fyri at vinna sømdir, sigur hon.

Ingeborg sigur, at óskilið við at taka upp verkfalsrakt arbeiði, er staðfest á fleiri ymiskum økjum - og ymsastaðni í landinum.

## Einki samband

Einki samband hevur verið millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum, síðan feløgini lýstu verkfall seinasta hósdag, og tí hevur formaðurin í FA onga hóming av, hvussu drúgt verkfallið kann gerast.

- Vit ynsktu at fáa somu lønarhækking, sum í sáttmálanum við SEV, kr. 16,48 í tvey ár. Okkara upprunaliga ynski var annars 12,60 um árið í tvey ár, men vit valdu at slaka nakrar krónur.

Hon sigur, at tá ið semingsstovnurin kom uppí samráðingarnar, byrjaði »sirkusið«, sum hon tekur til, av álvara.

- Vit vildu ganga við til at fara eitt sindur niður um sáttmálan við SEV fyri at fáa gongd á aftur, men tað nyttaði alt einki, tí semingsstovnurin segði blankt nei.

Ingeborg sigur, at arbeiðarafeløgini kundu á ongan hátt fara niður um tað, tey fingu við samráðingarnar fyri tveimum árum síðan.

- Sambært semingsuppskotinum, sum vit als ikki kundu góðtaka, fingu vit kr. 3,20 um árið í tvey ár, og tá er pensjónin íroknað. Hetta vrakaðu vit sjálvsagt blankt, tí her var als eingin ivi, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum fylgdu beiggja okkara

**Kartin Arge**

til gravar.
Takk til Pleyguheimið á Tvøroyri fyri at tit vóru so góð við Kartin, takk til sjúkrahúsið, takk til gravarar, sangarar og berarar.
Takk øll tit, sum hjálptu til við jarðarferðina.
Takk øll tit, sum vitjaðu hann á sjúkrahúsinum og á pleyguheiminum.
Ein serlig tøkk til Elina og Hans Jacob og familju teirra, sum so hjartaliga tók sær av jarðarferðini hjá Kartin.
Gud vælsigni tykkum øll.

*Kærar heilsanir*
**Mia og Harda**




